Uppgávur til **næmingin**
Sum rótskot



Marjun Syderbø Kjelnæs

Sum rótskot

Bókadeild Føroya Lærarafelags 2020

Nám 2020
Rannvá Hansen, Gunvá Magnussen og Lis G. í Jákupsstovu

Áðrenn tit lesa

Hyggið at permuni. Hvør hevur skrivað skaldsøguna? Kenna tit Marjuna? Hava tit lisið nakað annað, sum hon hevur skrivað?

Lesið baksíðutekstin um bókina: *Hvat gert tú, tá fólk látast sum einki, meðan heimurin verður týndur? Og hvat gert tú, tá ein sjúka hóttir við at taka tínu bestu vinkonu frá tær? Tú hugsar kanska sum Pax: hygg her, eg eri 16 ár, ókey, chill, men tá tú veruliga,* ***veruliga*** *hevur fingið nokk av bullshittinum? Hvat tá?*

Hugsið og tosið um hetta – hetta kunnu tit ikki vita, so tit mugu gita:

- á hvønn hátt man heimurin verða týndur?
- hvør sjúka kann talan vera um?
- hvat man "bullshittið" vera fyri nakað?

Lesið eisini tey fýra bókaummælini. Tvey eru innan fyri permuna, og tvey eru á baksíðuni.

Hvussu eitur skaldsøgan? Hvat er eitt rótskot? Hyggið í Sprotan.

Hvussu er perman prýdd? Man tað siga nakað um, hvat skaldsøgan fer at snúgva seg um?

©Nám

Um rithøvundin

Marjun Syderbø Kjelnæs er fødd í 1974. Hon er uppvaksin og býr í Havn. Hon tók studentsprógv í 1993 og var útbúgvin sjúkrasystir í 1998, men seinastu nógvu árini hevur hon mest arbeitt sum rithøvundur. Hon hevur skrivað bæði stuttsøgur, yrkingar, barnabøkur, skaldsøgur og leikir. Í 2009 fekk hon 3 ára starvsløn úr Mentanargrunni landsins. Í 2011 vann hon norðurlendsku barnabókavirðisløninа fyri skaldsøguna *Skriva í sandin*. *Skriva í sandin* er týdd til bæði danskt og norskt. Í 2008 vann Marjun Barnabókavirðsløn Tórshavnar býráðs. Harumframt hevur hon fingið gávugóðs úr Grunni Thorvald Poulsens av Steinum. Frá 2004 til 2010 var Marjun nevndarlimur í rithøvundafelagnum.

Meðan tit lesa

Meðan tit lesa *Sum rótskot*, skulu tit minnast til at hava okkurt at skriva á hjá tykkum. Tit skulu leggja til merkis og skriva tað, sum tykkara bólkur er biðin um at gera.

Bólkaarbeiði

Bólkur 1: Eltið Fríðu, skrivið stikkorð, meðan lisið verður. Lýsið Fríðu.

Greiðið síðan frá sambandinum millum Fríðu og familjuna.

Bólkur 2: Eltið Miriam, skrivið stikkorð, meðan lisið verður. Lýsið Miriam.

Greiðið síðan frá sambandinum millum Miriam og Fríðu.

Bólkur 3: Eltið Steffan, skrivið stikkorð, meðan lisið verður. Lýsið Steffan.

Greiðið síðan frá sambandinum millum Miriam, Steffan og foreldrini.

Bólkur 4: Eltið Pax, skrivið stikkorð, meðan lisið verður. Lýsið Pax.

Greiðið síðan frá sambandinum millum Pax og Miriam og sambandinum millum Pax og Fríðu.

©Nám

Tá ið tit hava lisið

Greining og tulking

1. Tíð. Nær fer søgan fram? Hvussu long tíð gongur frá tí, at søgan byrjar, til hon endar?
2. Stað. Hvar eru vit stødd? Lýsið støðini.
3. Hvør er høvuðspersónur? Eru fleiri høvuðspersónar?
4. Aðrir persónar. Hvørjir persónar, umframt Fríðu, Miriam, Steffan og Pax, eru við í søguni? Veljið nakrar burturúr og lýsið teir.
5. Hvørji evni verða viðgjørd?
6. Hvussu er skaldsøgan bygd upp? Er hon í tíðarrøð ella loypir hon í tíð? Vísið á dømi.
7. Greiðið frá sjónarhorninum. Er tað tað sama alla tíðina ella skiftir tað? Vísið á dømi.
8. Hvussu er málið í bókini? Er bókin løtt at lesa? Eru nógv trupul orð? Vísið á fleiri dømi um ungdómsmál.
9. Hví man Marjun hava skrivað bókina? Hvør er boðskapurin? Kunnu vit læra nakað av bókini?

Aðrar uppgávur

- Er samsvar millum permu, heiti og innihald?
- Finn tað petti í bókini, sum tær dámar best. Les upp fyri flokkinum. Sig kanska frá, hví tær dámar júst hetta pettið.
- Skrivið loggbók.
- Skrivið bókaummæli líknandi teimum í bókini.
- Lurtið eftir broti úr Summartímanum 18.08.2020, kvf.fo (frá 22. min).
- Lurtið eftir poddvarpinum, sum liggur á snar.fo

©Nám